Einasta blaðið 5 ferðir um vikuna

tíðindablaðið **sosialurin**

Telefon 11820 Telefax 14720

Sosialin finnur tú á Internet:
http WWW.cybernet.dk/faroe-news
e-mail sosialur@olivant.fo

## veðrið

Eitt lagtryst yvir Noreg stendur at kalla í stað, men grynnist skjótt. Eitt annað lagtryst vestan fyri Skotland flytir seg spakuliga eysturyvir og fer fram við Føroyum sunnanfyri og síðani í ein landnyrðing móti Finnlandi. Køld luft við ælingi rekur av norði og landnyrðingi móti Føroyum.

**Hósdag og friggjadag**



Mest skyggjað við regni ella ælingi av og á, men kortini onkrir sólglottar. Hitin verður millum 7 og 10 stig. Gul til strúk í vindi 5 til 10 m/s av norði og landnyrðingi.

**Leygardag, sunnudag og mánadag**

Fyri tað mesta turt og sólskin, tó møguliga okkurt ælið. Gul til strúk í vindi av norði og landnyrðingi 5 til 10 m/s, sum minkar til gul til stívt andøvsgul 3 til 8 m/s av landnyrðingi. Hitin um dagin liggur um 10 stig og um náttina 5 stig.

## óli teknar

*Yvirlýsing*




**Útlendskar stórfyritøkur, við tilknýti til Føroyar, bæði krevja og fremja egin áhugamál í sambandi við stovnsrøkt og umhvørvi okkara**

# Jústinus fer til Singapore



Edvard Joensen

Um miðjan august fer Jústinus Leivsson Ejdesgaard saman við konuni Poulu og sonunum Edwardi til Singapore, har tey skulu taka við sera spennandi starvi sum hjálparfólk við donsku sjómanskirkjuna í býnum. Hóast starvsøkið er við Den Danske Sømandskirke i fremmede havne, er tað føroyska sjómanskirkjan, sum sendir tey út.

Arbeiðið hjá Jústinusi verður í høvuðsheitinum at vitja umborð á donsk skip, sum koma til Singapore. Og tey eru ikki so fá. Roknað verður við, at umleið 800 donsk handilsskip vitja árliga. Og við teimum eru rættuliga nógvir føroyingar. Umframt skal Jústinus eisini virka sum deknur í kirkjuni.

Tá so nógv skip koma, sigur tað seg sjálvt, at nógv fólk vitjar sjómanskirkjuna. Eisini onnur enn sjómenn. Í fjør vitjaðu umleið 11.000 fólk kirkjuna. So Poula, sum verður oldfrúa, fær so sanniliga eisini nokk at ferðast til.

Vanligt er, tá fólk fara í slík størv, at útsendingarguðstænastur eru í Føroyum fyri teimum, áðrenn farið verður heiman. Sunnudagin 4. august verður útsendingarguðstænasta í Oyndarfjarðar Kirkju, haðani Jústinus er ættaður. Guðstænastan verður til vanliga kirkjutíð. Jógvan Fríðriksson, sóknarprestur, fer at prædika yvir dagsins tekst, meðan Henning Bøgesvang, formaður í stýrinum fyri føroysku sjómanskirkjuna, fer at halda hátíðartaluna.

FLOGFRAKT * SJÓFRAKT
SAFARI TRANSPORT
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tlf. 1 2222

FARTELEFONIR
NMT 900 NMT 450
MOTOROLA
BENEFON
NOKIA
FLEIRI YMISK MERKI AT VELJA ÍMILLUM
Storno
Hendan A 6 - Tórshavn
Tlf 14414 - Fax 18045

SJÓNVARPSTÆNASTA
RADIOTÆNASTA
ANTENNUARBEIÐI
RADIOHANDILIN
v. E. & P. Persson P/f
Tlf. 18277 Fax. 18377

## Vestfalskyrrindi

1. juli: Fullmáni/ Mánin næstur jørðini
7. juli: Seinna kvarter

| Dato | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | Haraldssundi/Leirvíksfirði fp. | Haraldssundi/Leirvíksfirði sp. | Skúvoyarfirði/Skopunarfirði fp. | Skúvoyarfirði/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. juli | 1011 | 2236 | – | 1211 | 0826 | 2051 | 1026 | 2251 | 0911 | 2136 | 0926 | 2151 |
| 5. juli | 1101 | 2325 | 0036 | 1301 | 0916 | 2140 | 1116 | 2340 | 1001 | 2225 | 1016 | 2240 |